## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Leivur Holm**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur
til Tvøroyrar Kirkju.
Takk til tykkum, sum ringdu og vitjaðu inn á gólvið.
Takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til
við jarðarferðina og við ervið í heiminum.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til
hansara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga takk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Judith**
**Julianna, Elisabeth og Kári**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu,
tá ið okkara elskaði sonur, beiggi, svágur, ommusonur,
bróður- og systursonur og drongur

**Hans Dávid Petersen**

so brádliga varð tikin frá okkum.

Takk tit mongu, sum leitaðu.
Takk fyri bøn og forbøn.
Takk fyri vøkru orðini í kapellinum og í kirkjuni.
Vit takka familju, bygdarfólki, vinum og kenningum,
sum hava hjálpt okkum hesa sváru tíð.
Hotel Norð og øllum tykkum, sum hjálptu til har
og øllum tykkum, ið fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað á foldum.

Gud vælsigni tykkum øll.

Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

*Familjunnar vegna*

**Elsuba og Petur, Malena, Sólja Thomina,**
**Jóhan Heini, Elsuba Malena, Pætur og Jákup**

# Ver takksamur fyri tað ið tú hevur

**Henda fitta, men álvarsama søga, hevur verið um umfari sum teldupostur í desember:**



23. desember skundaði eg mær oman í býin at keypa tær síðstu jólagávurnar. Tá eg kom oman, og sá øll fólkini har, hugsaði eg við mær sjálvari, ”hetta kemur at taka øldir, og eg havi enn nógvar handlar at fara í.”

Jólini verða strævnari fyri hvørt ár. Eg hevði ynskt, at eg kundi lagt meg at sova, og vaknað aftur aftaná jól. Tá eg kom í leikutoyshandilin, fór eg at hyggja eftir prísunum. Eg hugsaði við mær sjálvari, um børn yvirhøvur spæla við so dýr leikutoy?

Lítla løtu seinni, sá eg ein lítlan drong, ið var eini 5 ára gamal. Hann helt um eina dukku, móti bringu síni. Hann streyk dukkuni um hárið, og tóktist sera syrgin. So vendi hann sær móti eini eldri konu, ið stóð við hansara lið, ”omma, ert tú sikkur upp á, at eg ikki havi nóg nógvar pengar?” Gamla konan svaraði, ”tú veit, at tú ikki hevur ráð til dukkuna, góði” So bað hon hann bíða í 5 minuttir, meðan hon fór at hyggja seg um.

Lítli drongurin helt enn í dukkuni. Eg fór yvir til hann, og spurdi hvør skuldi hava dukkuna. ”Hetta er dukkan, sum systir mín elskaði og ynskti sær áðrenn jól. Hon var sikkur í, at jólamaðurin fór at geva sær hana.”

Eg segði við hann, at kanska hann fór at geva henni hana. Tað skuldi hann ikki vera so bangin um. Men hann segði syrgiliga við meg, ”Nei jólamaðurin kann ikki geva henni dukkuna, har hon er nú. Eg má geva mammu hana, so hon kann geva henni hana, tá hon fer har til.” Eygu hansara fyltust við tárum, tá hann segði hetta. ”Systir mín býr hjá Jesus Pápa nú. Babba sigur at mamma fer eisini skjótt har til, so eg helt, at hon kundi taka dukkuna við fyri meg, so systir mín fær hana.”

Hjartað mítt leyp fleiri sløg um. Lítli drongurin hugdi uppá meg. ”Eg bað babba siga við mammu, at hon skuldi ikki fara orduliga enn - hon mátti bíða til eg kom heim aftur frá handlinum.” Síðan vísti hann mær eina mynd av sær sjálvum, har hann var smílandi og í góðum lag. ”Hesa myndina skal mamma eisini hava við, so hon ongantíð fer at gloyma meg. Eg elski mammu, og vildi ynskt at hon ikk var noydd at fara. Men babba sigur, at hon má fara, til at vera hjá systir míni.”

So hugdi hann aftur at dukkuni - við sorgarfullum eygum. Eg fór spakuliga niður í taskuna, og tók nakrar pengar, og segði við dreingin, ”skulu vit prøva at telja tínar pengar aftur?” Ok segði drongurin, ”eg hopi at eg havi nokk.”

Uttan at hann legði merki til tað, legði eg pengar saman við hansara, og vit byrjaðu at telja. Har var nokk av pengum fyri dukkuna, og eitt sindur leyp av. ”Takk Gud fyri, at tú gav mær nokk pengar!”

”Í gjár, áðrenn eg legði meg at sova, bað eg Gud um at vera sikkur í, at eg hevði nokk av pengum fyri dukkuna til systir mína - Hann hoyrdi meg.”

”Eg ynskti eisini at hava pengar til at keypa eina hvíta rósu til mammu. Mamma elskar hvítar rósur, men eg tordi ikki at biðja Gud um ov nógv, men alíkavæl gav hann mær nokk.

Lítla løtu seinni kom omma hansara aftur eftir dronginum.

Eg kláraði at keypa restina av gávunum, tó við heilt aðrari tankagongd. Eg kláraði ikki at lata vera við at hugsa um lítla drongin.

So minntist eg á tíðindi í blaðnum, fyri tveimum døgum síðan. ”Maður koyrdi fullur, og rendi á ein bil, har ein ung kvinna og ein lítil genta vóru í. Lítla gentan doyði á staðnum, og mamma hennara endaði í koma.” Familjan mátti velja, um kvinnan skuldi í respirator ella ikki. Kvinnan fór ikki at vakna aftur úr koma. Var hetta familjan hjá lítla dronginum??

Tveir dagar eftir at eg hevði møtt dronginum, læs eg í blaðnum, at unga kvinnan var deyð. Eg kundi ikki lata vera, fór til handils og keypti eitt blómutyssi av hvítum rósum, og fór á líkhúsið, har fólk kundu síggja kvinnuna síðstu ferð, áðrenn hon fór til gravar.

Hon lá í kistuni í vøkrum hvítum kjóla, við einari hvítari rósu í hondini, og myndina av lítla dreinginum, og dukkuni á bringuni.

Eg fór grátandi avstað, og føldi at lív mítt var broytt. Kærleikin sum hesin lítli drongur hevði til mammu og systir sína, er enn tann dag í dag ringur at ímynda sær.

Og í einum sekundi, tekur ein rúsaður maður alt frá honum.

Gleðilig Jól - og koyrið varliga!

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Ein jólaheilsan frá Miðnámsskúlanum

**Verkevnisvika – frá 15. til 21. desember**

**JÓLAHEILSAN**

Hesar dagar hevur verkevnisvika verið á Miðnámsskúlanum í Suðuroy. Lyklaorðini vóru kreativitetur og innovatión – hvussu vit kunnu menna oynna.

Næmingarnir vórðu býttir í 10 bólkar, ið arbeiða við ymiskum evnum og arbeiðsháttum, t.d arbeiða næmingarnir við evnum sum t.d.: Suðuroyarætlanin, sniðgeving, journalistikkur, listarligt umhvørvi, leikur og gykl, alternativ orka, tekning og list, filmur, spøl/folklore og bókmentaverkstaður.

Tað er við at gerast siðvenja, at vit á Miðnámsskúlanum enda árið við eini evnisviku. At næmingar tvørturum flokksmørk velja eitt evnisøki, ið er nakað heilt annað enn tað, ið regluligi skúladagurin bjóðar. Eina tílíka viku koma nýggir eginleikar og evni á dagsskránna - skapanarkreftir, ið ikki vanliga síggja dagsins ljós. Vikan endaði mikudagin 21. við framløgum. Ótrúligt, so nógv kann spyrjast burtur úr so fáum døgum, og síðstu árini eru fólk ikki farin heim, tá skúladagurin er liðugur í evnisvikuni. Nei, tá deadline nærkast, vísir tað seg, at øll vilja, at framløgan er so góð sum gjørligt, og fleiri hava arbeitt til langt út á náttina.

Til dagligt síggjast úrslitini á einum skúla jú ikki so týðiliga gjøgnum árið, har alt verður skrúvað upp til várið, tá próvtøkurnar eru.

Ein serlig tøkk til Jan Müller á Sosialinum, Martin Næs á Landsbókasavninum, Sunrid Olsen á Landsskjalasavninum, bussførarunum Hera Vík og Regin Dam, Jógvan bónda í Dúvugørðum, Annebin Ellingsgaard á Fornminnasavninum Látrinum á Eiði, Jákup Joensen, ið vísti fram nýumvældi kirkjuna á Eiði, Lisu Ellingsgaard og manninum á glasvirkinum á Eiði og ikki at gloyma Petur Jacob Sigvardsen, ið rúnarbant okkum við sínum framúskarðandi frásøguhátti.



*Bygdarhúsið við Gjógv var góður karmur til slíkt endamál og bygdin er vøkur við ríkari søgu*